ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Vit eru vísir í, at Madeleine er á lívi, og vit vita eisini, hvør tað var, sum burturflutti hana*

*(Francisco Marco)*

# Madeleine er á lívi

**Spanskir agentar siga seg vera sannførdar um, at Madeleine McCann er á lívi**

Tað er bretska blaðið News of the World, sum ber tíðindini frá sponsku agentunum, og hóast blaðið ber orð fyri at fara heldur lætt um sannleikan av og á, er tað ein sannroynd, at blaðið hevur verið við til at avdúka ymisk mál.

News of the World sigur frá spanska agentafelagnum Metodo 3, at teirra agantar eru vísir í, at Madeleine McCann er á lívi. Agentarnir siga, at gentan varð burturflutt, og at teir vita, hvør tað var, sum tók hana.

-Vit vita, hvørjir burturflytararnir eru, og vit vænta at finna teir skjótt, sigur leiðarin hjá agentunum, Francisco Marco, við bretska blaðið.

Sambært Francisco Marco hevur ein kvinna greitt frá, at hon sá ein mann koyra Madeleine McCann inn í ein vøruvogn einastaðni í Portugal tann 5. mai ella tveir dagar eftir, at gentan hvarv. Gerry McCann hevur fyrr sagt, at hann er sannførdur um, at burturflytararnir hildu eyga við Madeleine í fleiri dagar undan burturflytingini.

BBC vísir í kvøld eina sjónbandsupptøku við Gerry og Kate McCann, sum vinfólk teirra hava tikið upp. Løgreglan hevur noktað teimum at tosa alment um Madeleine, men á upptøkuni sita tey við hús og tosa um hana.



*Spanskir agentar vilja vera við, at Madeleine McCann er á lívi enn*

# Sidr kann hava kravt 15.000 mannalív

**900.000 húski í Bangladesh eru rakt av tropiska ódnarveðrinum, sum kann hava kravt 15.000 mannalív**

Eingin veit, hvussu mong mannalív tropiska ódnin Sidr kravdi, tá hon herjaði Bangladesh í síðstu viku. Almennu myndugleikarnir siga, at teir hava skrásett meiri enn 3.000 deyð, muslimski hjálparfelagsskapurin Reyði Hálvmáni sigur, at talið er oman fyri 10.000, og aðrir hjálparfelagsskapir siga, at ódnin hevur kravt umleið 15.000 mannalív.

Herskip og tyrlur royna at bjarga fleiri túsund fólkum, sum eru avbyrgd á smáum oyggjum í Bengalsku Víkini. Fleiri sita eisini avbyrgd í smáum bygdum fram við strondini.



*Sjógvurin, sum skolaði inn yvir láglendið í Bangladesh, hevur oyðilagt alla grøðina, og tí verður ovurstórur tørvur á matvøruhjálp*

-Bjargingararbeiðið fer at taka fleiri dagar, og fyrr enn tað er liðugt, vita vit ikki, hvussu mong mannalív eru týnd, sigur Ayub Miah, sum er ráðharri í stjórnini, og sum millum annað umsitur náttúruvanlukkur.

Myndugleikarnir meta, at 900.000 húsi eru rakt á ein ella annan hátt. Herumframt eru umleið 1.000 fiskimenn ikki komnir afturíaftur aftan á ódnina. Teir vóru til fiskiskap í Bengalsku Víkini, tá ódnin kom tann vegin á veg inn ímóti landi.

Sidr er tann ringasta tropiska ódnin, sum hevur herjað Bangladesh síðani 1991. Ta ferðina kravdi ódnarveðrið143.000 mannalív.

# Ætlaðu at skjóta skúlanæmingar

**Týska løgreglan hevur forðað fyri einum skúlahópdrápi**

Løgreglan í týska býnum Köln hevur tikið ein 18 ára gamlan drong, sum hevur viðgingið, at hann og ein vinmaður hansara høvdu lagt eina ætlan um at skjóta næmingar á einum studentaskúla. Tann 17 ára gamli vinmaðurin beindi fyri sær, áðrenn løgreglan fekk fatur á honum.

Tað var leiðslan á Gerhard Büchner-studentaskúlanum, sum varskógvaði løgregluna, tí tann 17 ára gamli hevði lagt nakrar myndir frá skúlahópdrápinum í Colombine út á internetið. Hópdrápið í Colombine í USA var í 1999, tá tveir næmingar skutu 13 fólk.

## STUTT SAGT

### Berlusconi nýggjan flokk

Fyrrverandi italski forsætisaráðharrin Silvio Berlusconi ætlar sær at stovna ein nýggjan flokk, sum skal hava heitið Flokkurin fyri frælsar italiumenn. Samstundis ætlar hann sær at avtaka flokkin Forza Italia, sum hann var við til at stovna fyrst í nítiárunum. Italskir fjølmiðlar skriva, at ætlanin hjá Silvio Berlusconi er at sleppa burtur úr teirri naggatódnini, sum høgraflokkarnir í Italia hava verið í seinastu tíðina. Harumframt væntar hann, at tann nýggi flokkurin kann herða mótstøðuna ímóti stjórnini hjá Romano Prodi, forsætisráðharra.

### Mótmæli í Belgia

Umleið 35.000 fólk gingu í gjár kravgongu í belgiska høvuðsstaðnum Bruxelles, har tey kravdu, at teir politisku flokkarnir finna eina semju um at skipa nýggja stjórn. Val var í Belgia tann 10. juni, men ósemja millum teir fransktosandi vallonararnar har suðuri í landinum og teir niðurlendskttosandi í Flandern hevur gjørt, at landið framvegis ikki hevur fingið nakra stjórn. Politiskir eygleiðarar í Bruxelles siga, at støðan er álvarssom, men teir vísa samstundis á, at hetta er ikki fyrstu ferð í loandsins 177 ára longu søgu, at landið liggur í stjórnarloysi.

### USA letur loyniliga hjálp

Amerikanska stjórnin hevur brúkt meiri enn 500 mió. krónur til at tryggja kjarnorkugoymslurnar í Pakistan. New York Times skrivar, at pengarnir eru brúktir tað seinasta hálvárið sum partur av einari loyniligari verkætlan hjá Bush-stjórnini. Týðandi embætismenn vátta fyri blaðnum, at pengarnir eru tiknir av ymsum kontum á fíggjarlógini, tí eingin beinleiðis játtan er til endamálið. Sambært New York Times eru pengarnir millum annað farnir til at útbúgva pakistanar innan kjarnorkutrygd og til at byggja ein serligan trygdarskúla í Pakistan.